## Bjarni og Andy við landsliðnum

**Bjarni Jørgensen av Skála og Andy Olsen úr NSÍ eru tiknir í landsliðshópin. Hetta eftir avboð frá Christian Restorff Mouritsen og Jón Róa Jacobsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Jógvan Martin Olsen hevur nú boðað frá tveimum broytingum í landsliðshópinum, sum um góðan mánað skal á árligu venjingarleguna.

Jón Rói Jacobsen er júst byrjaður tilveruna í danska AaB, og tí hevur hann fingið frí frá venjingarleguni. Christian Restorff Mouritesen var ein av nýggju monnunum, sum Jógvan Martin ætlaði at slúsa inn í landsliðshópin, men tað verður so ikki á hesum sinni. Tað hevur nevnliga ikki eydnast honum at fáa frí í Onglandi.

Ístaðin eru tveir spildurnýggir landsliðsleikarar tiknir út til hópin. Teir báðir eru Bjarni Jørgensen úr Skála og Andy Olsen úr NSÍ.

Endaligi hópurin - sum tó enn kann broytast - sær nú soleiðis út: Jákup Mikkelsen, Hanus Thorleifsson, Bergur Midjord, Fróði Benjaminsen úr B36, Bárður Johannesen, Janus M. Joensen, Jákup á Borg, Kári Nielsen, Rasmus Nolsøe, Mortan úr Hørg úr HB, Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni, Hjalgrím Elttør úr KÍ, Símun Samuelsen úr Keflavík, Hanus Jacobsen úr GÍ, Hans Pauli Samuelsen, Bárður Olsen úr EB/Streymi, Pauli Hansen, Jónhard Frederiksberg, Bjarni Jørgensen úr Skála, Høgni Zachariasen úr ÍF, Andy Olsen úr NSÍ, Jann Ingi Petersen úr B68, Christian Høgni Jacobsen úr NSÍ, Óli Johannesen úr TB, Rógvi Jacobsen úr KR, Andrew av Fløtum úr Fremad Amager, Gunnar Nielsen, Jónas Tór Næs úr Frem, Jóhan Troest Davidsen úr Everton.

## Wurz fer til Williams

Royndarkoyrarin hjá McLaren-Mercedes hesi seinastu fimm árini Alexander Wurz fer nú til Williams liðið. Wurz, ið fyrr hevur koyrt fyri Bennetton liðið, verður roknaður sum ein tann besti royndar- og menningarkoyrarin í heiminum.

Wurz var í farna kappingarári ein av fríggjadagskoyrarum hjá McLaren. Í hesum starvi koyrdi hann triðja McLaren bilin helvtina av fríggjadøgunum áðrenn formel 1 koyringar. Hetta gekk sera væl. Hann hevði vanliga skjótastu tíðina fríggjadagar.

Í farna kappingarárið gekk so mikið væl hjá McLaren, at liðið ikki sleppur at hava ein triðja bil við fríggjadag undan formel 1 koyringunum. Hetta sleppa fremstu liðini ikki. Hjá Williams gekk munandi verri, tí hevur liðið ein eykabil fríggjadagar, og henda bil sleppir Wurz at koyra. Tað er eingin ivi um, at hetta er høvuðsorsøkin til at Wurz fer úr McLaren til Williams.

Sjálvur sigur eysturríski koyrarin við f1.com, at hann hevur havt stóra virðing fyri liðstjóranum Frank Williams, síðan fyrstu ferð teir hittust í 1996. Líka síðan tá, hevur Wurz ynsk at sloppið at koyra fyri Williams liðið, og endiliga er tað vorðið veruleiki.

**- nud**

## Keðiligur klassikari á Highbury

Arsenal og Manchester United leiktu í kvøld ein málleysan javnleik í einum heldur keðiligum dysti

Málmøguleikarnir vóru fáir, og hvørki av liðunum megnaði veruliga at seta seg á dystin, hóast bæði liðini høvdu ein sigur fyri neyðini.

Um United ætlar sær at elta Chelsea, kunnu javnleikir als ikki nýtast, og tí var hetta úrslitið ikki nøktandi hjá United.

Arsenal hinumegin hevur havt eitt sera vánaligt kappingarár higartil, og liðið liggur í løtuni á fimta plássi. Chelsea er nú trettan stig frammanfyri United, og gjógvin økist alsamt.

**-SíS**

# A-landsliðið skal til USA




*Florida er heldur eksotiska ferðamálið, har føroyska fótbóltslandsliðið í ár skal á venjingarlegu*

**Enn eru ikki allir smálutir komnir upp á pláss. Men ætlandi verður tað so, at fótbóltslandsliðið í ár heldur árligu venjingarleguna í Orlando, Florida, heldur enn á la Manga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

La Manga í Spania ella á Cypros. Tað plagar at vera støðin, har landsliðsspælarar í góðveðrinum í februar mánaði av álvara byrja fyrireikingarnar til nýggja landsliðsárið.

Hendan venjingarlegan hevur í nógv ár verið partur av sjónvarpssáttmálanum, sum Fótbóltssambandið hevur havt við týska SportsFive. Í síni tíð sum ein av avgjørdu fortreytunum fyri menning av føroyskum landsliðsfótbólti, men seinnu árini meira at rokna sum týdningarmikil liður í fyrireikingunum til nýtt landsliðsár. Og ikki minst sum ein partur, har ung landsliðsevni hava fingið sín møguleika undir umstøðum, sum ikki eru eins kroystar, sum krevjandi undankappingardystir eru tað.

### Ein nýggj byrjan

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, váttar, at tað hevur verið arbeitt við málinum. Men hann leggur afturat, at allir smálutir enn ikki eru komnir í rættlag.

- Vit ætlaðu annars, at hetta skuldi verða greitt fyri jól, men tað bleiv tað so ikki. Eitt nú er spurningurin um innivist ikki endaliga avkláraður.

Tað skilst tó á øllum brøgdum, at talan einamest er um smálutir, sum gjarna skuldu verið greiðir heilt skjótt. Og Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, tykist eisini staðfesta, at legan hesa ferð verður í USA.

- Fyrst og fremst, so ynskti eg, at vit skiftu umhvørvið til venjingarleguna út. At tað júst gjørdist USA, var kanska meira av tilvild. Tað hóskar seg líka sum væl at nýta hetta sum eitt høvi at markera eina broyting, og tí varð ynskið sett fram, sigur hann.

Jógvan Martin leggur afturat, at talan sum so ikki er um nakra ónøgd við umstøðurnar á Cypros og á la Manga. Men hann dylir samstundis ikki fyri, at umstøðurnar í Florida tykjast vera í topp.

Venjingarlegan hjá landsliðnum byrjar hesa ferð 19. februar. Í mun til undanfarnu legurnar verður talan hesa ferð um heldur drúgvari tíðarskeið, og verður tað soleiðis ikki fyrr enn 1. ella 2. mars, at hópurin verður aftur í Føroyum.

Tveir dystir skulu ætlandi spælast á ferðini, meðan talan hinar dagarnar verður um venjing.

# Magni Mohr á A-landsliðið

**Fotbóltssambandið hevur boðað frá, at Magni Mohr nú verður knýttur at landsliðnum sum fysiskur venjari**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kanska týdningarmesti persónurin handan meistaraheitið hjá B36 verður nú knýttur at fótbóltslandsliðnum.

Sum fysiskur venjari varð leikluturin hjá Magna ferð eftir ferð sagdur at vera ein hin fremsta orsøkin handan góðu B36-úrslitini í fjør. Ikki minst í UEFA-Cup, har felagið sum fyrsta føroyska felag spældi seg víðari til næsta undanumfar.

Nú er so gjørdur sáttmáli, sum komandi tvey árini knýtir 32 ára gamla vágbingin at arbeiðinum kring A-landsliðið, har hann kemur at arbeiða saman við Jógvan Martini Olsen um kropsligu venjingina hjá spælarunum.

Á heimasíðuni staðfestir FSF, at ábyrgdarøkini hjá Magna vera:

- at staðfesta kropsliga støðið hjá føroyskum landsliðsleikarum ígjøgnum eitt tvey ára tíðarskeið.
- at staðfesta kropsliga støðið hjá spælarum í Formuladeildini á ymiskum tíðarbilum ígjøgnum kappingarárini 2006 og 2007.
- at geva landsliðsvenjaranum neyva vitan um kropsliga støðið hjá einstaka spælaranum, og hvussu henda vitan kann nýtast í taktiskum samanhangi.
- at menna eina fasta test- og kanningarskipan á føroyska A-landsliðinum.
- at gera eina profilskipan av leikarunum.

### Mugu kenna støðuna

Jógvan Martin Olsen, A-landsliðsvenjari, staðfestir, at hann alla tíðina hevur havt eitt ynski um, at Magni verður knýttur at landsliðsarbeiðinum.

- Fyrst og fremst, so kunnu vit við hesum gera nakrar staðfestingar av, hvar spælararnir eru staddir fysiskt. Ikki minst er ógvuliga stórur munur á hesum, tá venjingarnar byrja á vári.

Jógvan Martin leggur tó stóran dent á, at hetta fyrst og fremst skal nýtast sum eitt arbeiðsamboð, og at talan tí ikki verður um kropsligar servenjingar í landsliðshøpi.

- Ætlanin er, at Magni skal taka nakrar royndir av spælarunum hvør sær. Fyrstu royndirnar verða tiknar á komandi venjingarleguni, og so er ætlanin, at hesar eisini verða gjørdar í mars, juni, august, september, oktober og november. Altso tær terminir, har vit møguliga koma at spæla landsdystir.

- Ikki minst kann hetta fáa týdning, um vit enda í einum undankappingarbólki við átta liðum. Tað skal sjálvandi ein telving til, men er talan um ein av stóru bólkunum, so er sannlíkt, at vit koma at spæla landsdyst í antin mars ella november. Og tá er umráðandi at vita, hvussu vit á bestan hátt kunnu fyrireika okkum til hetta, sigur Jógvan Martin Olsen.